Kári P. Højgaard:

# Verður mestur formaður

**Kári P. Højgaard varð valdur á ting fyri Sjálvstýrisflokkin, og hann roknar við eisini at gerast formaður. Hann er klárur at geva løgmanni nakrar dagar, men hann letur ongar hurðar aftur**

LØGTINGSVAL
*Heri á Rógvi*

Kári P. Højgaard vil ikki lata nakrar hurðar aftur fyri nøkrum samgongumøguleika. Hann heldur ikki, at tað er ódemokratiskt, um sitandi samgonga heldur fram.

– Nú fáa vit at síggja, sigur Kári P. Højgaard.

Tað gjørdist ein afturgongd fyri Sjálvstýrisflokkin við valið týsdagin. Frá at hava tveir tingmenn fekk flokkurin bert tann eina hesuferð. Hesin gjørdist kanska eitt sindur óvæntað Kári P. Højgaard, sum hevur havt sætið á tingi hesa seinastu tíðina sum varamaður fyri Sámal Petur í Grund. Hesin sami Sámal Petur í Grund misti størsta partin av sínum yvir fimmhundrað atkvøðum.

Tá Kári P. Højgaard fekk 169 persónligar atkvøður, og býtið gjørdist soleiðis, at Sjálvstýrisflokkurin fekk sítt eykavalda umboð í Eysturoynni, so gjørdist Kári P. Højgaard nýggjur tingmaður.

### Skuffaður

Eftir at úrslitið var greitt, so var tað, sum verða mann, ein fegin Kári P. Højgaard, sum tók ímóti heilsanum úr eyst og vest, men tað var tó bert hansara persónliga avrik, ið frøddi nýggja tingmann Sjálvstýrisfloksins.

– Eg eri skuffaður av úrslitinum hjá flokkinum, sigur Kári P. Højgaard, og tá verður serliga hugsað um, at flokkurin misti annan mannin í mun til seinasta val.

### Formaður

Sum støðan er nú eitur formaðurin í Sjálvstýrisflokkinun Eyðun Elttør, men tað er nógv, sum bendir á, at Kári P. Højgaard verður nýggjur formaður innan langa tíð.

– Tá tað bara er ein tingmaður, so er tað rættiliga nærliggjandi, at eg gerist formaður, men tað er ikki avgjørt enn, sigur Kári.



*Kári Højgaard er nýggjur tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin, og væntandi gongur tað ikki rúm tíð innan hann kann kalla seg formann í flokkinum*

Hann bar seg undan at svara, um hann ynskir ella vil gerast formaður.

Sjálvur heldur Kári P. Højgaard, at polariseringin er orsøkin til, at valið hevur háttað seg, sum tað hevur. Hann heldur ikki, at Sjálvstýrisflokkurin hevur nóg væl megnað, at fingið sín boðskap fram.

Sum einsamallur tingmaður væntar Kári P. Højgaard, at tað verða strævin tøk í nýggja tinginum.

# Tjóðveldismaður í Kollafirði

**Kollafirðingar hava savnað seg um ein kollfirðing, sigur nýggi tingmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum í Norðurstreymoy**

LØGTINGSVAL
*Edvard Joensen*

Kollfirðingar vilja hava ein løgtingsmann, heldur Niklái Petersen, sum er nývaldur løgtingsmaður fyri Norðurstreymoy. Hann fekk nógv flestar atkvøður á tjóðveldislistanum í Norðurstreymoy.

Fólkaflokstingmaðurin í Kollafirði, Jákup Suni Joensen, stillaði ikki uppaftur, og tað metir Niklái Peterswen vera eina orsøk til, at hann varð valdur. Hann sigur tó, at hann hevur rikið væl upp undir valið.



*Niklái Petersen, nýggjur tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin í Norðstreymoy.*

Hans Pauli Strøm:

# – Eg hevði roknað við tí

**Úrslitið í Norðstreymoy kemur ikki óvart á Hans Paula Størm, sum ikki varð afturvaldur**

LØGTINGSVAL
*Heri á Rógvi*

Tað gekk ikki hjá Hans Paula Strøm. Hóast stóra persónliga framgongd, so varð tað ikki til eitt pláss í Løgtinginum hjá nývestmenninginum, sum seinastu fýra árini hevur umboðað Javnaðarflokkin í Norðstreymoyar valdømi.

Hann var eyka valdur við seinasta val, men hesin ferð skuldi tað vísa seg, at eykavaldi javnaðartingmaðurin fall í Suðurstreymoy.

– Eg hevði roknað við tí. Eg eri ógvuliga fegin um mítt persónliga úrslit, men eg vildi havt flokkin at klára seg betur. Vit mugu nú hyggja frameftir, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann heldur, at valstríðið í stóran mun hevur verið ein uppgerð millum samgonguna og andstøðuna, og hetta hevur so ikki gagnað Javnaðarflokkinum.

– Sambandsflokkurin gjørdist stóri vinnarin, og tað undrar meg, at Tjóðveldisflokkurin gekk aftur, hóast teir hava lagt nógva orku í valstríðið, sigur Hans Pauli.

Hans Pauli vendir nú aftur til sítt borgarliga starv á Hagstovuni fulla tíð. Hann hevur verið har hálva tíð, meðan hann hevur sitið á tingi, men nú verður tað Hagstovan, ið fær fullu gleðina av Hans Paula Strøm.

Hann sigur seg vóna, at Løgtingið fær skapt betri kor fyri tey eldru og verkafólki.



*Hans Pauli Strøm er ikki tingmaður longur.*

Jógvan Durhuus:

# Stillar ikki uppaftur

**Jógvan Durhuus misti tingsessin hjá sær til partamannin Nikláa Petersen. Hann hevði roknað við hesum. Jógvan stillar ikki uppaftur til næsta val**

LØGTINGSVAL
*Heri á Rógvi*



*Jógvan Durhuus slap ikki aftur á ting hesaferð. Royndi politikarin ætlar ikki at stilla upp til næsta val*

– Eg hevði roknað við tí.

Hesi vóru fyrstu orðini frá Jógvani Durhuss, tá vit ringdu hann upp mikumorgunin. Tjóðveldisflokkurin fekk annan tingmannin fyri Norðstreymoy, men hesin gjørdist ikki sum við seinasta val, Jógvan Durhuus. Niklái Petersen kláraði at yvirhála veteranin úr Vestmanna.

Persónliga atkvøðutalið hjá Jógvani Durhuus gjørdist 158. Við seinasta val í 1998 fekk hann 231 persónligar atkvøður,soleiðis at tað gjørdist ein persónlig niðurgongd fyri vestmenningin.

Jógvan Durhuus er tó vorðin varamaður á tingi.

Hann hevur ongar ætlanir um at stilla upp aftur.

– Eg ivaðist leingi, hvørt tað var rætt at stilla upp ella ikki. Eg fekk tó nógvar áheitanir aðrastaðni frá, so eg gjørdi av at royna hetta einaferð enn. Úrslitið hevði eg eisini roknað við. Eg eri vorðin so mikið gamal nú, at eg fari ikki at stilla uppaftur til næsta løgtingsval, sigur Jógvan Durhuus.

Tað var serliga støðan í Kollafirði, ið gjørdi Jógvan næstan vísan í, at hann ikki kom aftur á ting. Har vóru fleiri valevni, ið fyrr hava klárað seg væl, sum ikki stillaðu upp, og kollfirðingar plaga at savna seg um einkultpersónar, og tað gjørdu teir eisini hesaferð.

At Sambansflokkurin gjørdist sterki flokkurin í Norðstreymoy kemur ikki óvart á Jógvan Durhuus.

– Teir hava altíð verið sterkir her. Tað snúði seg meira um at fáa tað aftur í rættlag hjá teimum, sigur Jógvan Durhuus.

Hann heldur, at tað hava verið ræðumyndirnar hjá Sambandsflokkinum, sum hava sigrað, tí tað kann ikki vera politikkurin, sigur fyrrverandi tingmaðurin.

### Sitið nógv ár

Um Niklái Petersen loyvir Jógvani framat onkra ferðina næstu fýra árini, so verður hetta triðji tingsalurin, ið Jógvan sleppur at royna á einari langari yrkisleið innan politikk.

Fyrstuferð Jógvan stillaði upp var í 1966. Hann varð fyrstuferð valdur á ting í 1970. Hann varð afturvaldur í 1974 og 1978. Við valið í 1980 slap hann ikki inn, men hann kom innaftur í 1984 og 1988. Síðani varð hann valdur aftur í 1994 og hevur sitið síðani.

Hann hevur roynt at vera bæði landsstýrismaður, løgtingsmaður og varaløgmaður í sínum 36 árum í politikki.

Jógvan er í dag 64 ára gamal, og hetta er næstan pensjónsaldur, sigur hann. Hann avvísir tó ikki ein landsstýrismannasess, um hesin skuldi verið boðin honum.



# Pápi, ikki pápi ella inn á ting

**Bárður Nielsen er nývaldur í Norðstreymoy fyri Sambandsflokkin. Saman við øllum valdramatikkinum sat hann eisini í spenningi og bíðaði eftir, um hann møguliga skuldi gerast pápi sjálvan valdagin**

LØGTINGSVAL
*Ingrid Bjarnastein*



*Bárður Nielsen sat í øllum valdramatikkinum týskvøldið, eisini og bíðaði eftir um hann møguliga skuldi gerast pápi valkvøldið*

Tá vit tosaðu við Bárð tíðliga mikumorgunin, sigur hann, at hann er enn ikki er vorðin pápi.

– Nei, har steðgaði alt upp týsmorgunin, sigur Bárður Nielsen. – Hon er í Havn, so nú eri eg bara standby til okkurt hendir.

Men Bárður sat sum kunnugt ikki bert og bíðaði eftir, at konan skuldi eiga. Bárður Nielsen var uppstillaður sum valevni fyri Sambandsflokkin í Norðstreymoy. Týskvøldið fekk hann so tey gleðiligu boð, at hann var sloppin inn á ting við 196 persónligum atkvøðum. Sambandsflokkurin sjálvur var fremstur í Norðstreymoy, og Bárður var næstur á toppskoraralistanum, bert góðar 30 atkvøður aftanfyri Nikláa Petersen í Tjóðveldisflokkinum.

Hetta er fyrstu ferð Bárður er valdur inn á ting, men tó ikki fyrstu ferð hann skal verða pápi, so seinnu mannagongdina kennir hann hóast alt. Men hvat ætlar Bárður sær nú?

– Ja, tað verður so fyrst og fremst at seta meg inn í hesa nýggju mannagongdina. Eg vóni, at vit koma í samgongu. Tað tykist ikki vera nakað serliga áhugavert at sita uttanfyri, tí tað er sum tú lítla og onga ávirkan hevur tá, sigur Bárður Nielsen.

### Betra heilsuverkið

Sjálvur heldur sambandsmaðurin, at nógv skal betrast. Millum annað standa heilsuverkið og almannaverkið fyri tørni.

– Heilsuverkið skal betrast og fáast upp á eitt hægri støði. Tað, at deildir lata aftur, líkist ongum, og eigur hetta at verið fingið uppá pláss, sigur Bárður og vísir á, at eisini almannaverkið eigur at betrast.

– Almannaverkið hevur alt ov vánaliga tænastu. Um tú til dømis ringir til tey, kunnu tað ganga fleiri vikur og upp í mánaðar áðrenn tú fært svar, og soleiðis kann tað ikki vera í einum vælferðarsamfelag. Eg veit ikki, hvat tað er. Um tey kanska eru undirmannað ella um tey ikki eru so tænastusøkjandi.

Um tað lokalpolitiska dugir Bárður Nielsen ikki at siga, hvat hann ætlar sær at gera. Hann vil ikki lova nakað, sum hann síðani ikki megnar at halda. Men í valstríðnum lovaðu flest allir politikkarar í Norðstreymoy, at vegurin norð til Tjørnuvíkar og Haldórsvík skal betrast, og er hetta nakað, Bárður ætlar sær at virka fyri og hjálpa til fyri at fáa ígjøgnum.

Sjálvur sigur hann seg ikki hava væntað, at sleppa inn, men vónirnar vóru har, og sigur hann, at stemningurin var positivur.

– Eg trúði uppá, at eg slapp inn, men eg haldi ikki, at eg havi rikið nakað serligt. Eg havi skrivað í bløðunum og so var eg í Norðurlandahúsinum tá tann seinasti valfundurin var. So havi eg eisini hongt plakatir upp her í Vestmanna og Norðstreymoy, men eg havi ikki ringt og tosa við fólk og tílíkt, greiðir Bárður frá.

Men ein fegin Bárður leggur afturat, at nú fer hann at arbeiða fyri ríkisrættarligu støðuni hjá Føroyum, og virka fyri at fáa viðurskiftini við Danmark í rættlag, og harvið royna at fáa klandrið vekk, sum hevur verið seinastu fýra árini.

Bárður Nielsen er ítróttarfólk burturav, og leggur hann tí stóran dent á mentan og ítrótt. Hann heldur, at tað er synd, at ung í dag bert sita frammanfyri eina teldu, og vil hann heldur hava, at tey fara út at røra seg. Tí vil hann virka fyri at geva ytru karmunum hjá mentanini og ítróttini betri sømdir, uttan tó beinleiðis at stuðla við peningi.

Hvussu fer at gangast við politikkinum fáa vit at síggja, men um alt gongur eftir ætlan, verður nýggi sambandstingmaðurin úr Norðstreymoy pápi um ikki alt ov langa tíð.

# Norðoyingar mist einasta kvinnuliga umboðið á tingið

**Kvinnurnar í Norðoyggjum fingu ikki góða undirtøku á valinum týsdagin. Rúna Sivertsen hjá Fólkaflokkinum hevur í 6 ár sitið á tingið í sessinum hjá Anfinni Kalsberg, meðan hann ávíkast hevur sitið við fíggjarmálum og verið løgmaður, men hetta verður nú broytt**

LØGTINGSVAL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Um Anfinn heldur fast við løgmannssessin, so verður tað ikki Rúna Sivertsen, sum kemur inn í staðin. Jákup Mikkelsen fór avstað við fleiri atkvøðum enn Rúna, og tí verður tað hann, sum kemur inn á plássið hjá Anfinni.

Rúna Sivertsen hevur verið politiskt virkin í fleiri ár, og í 6 ár hevur hon verið einasta kvinnuliga umboðið hjá Norðoyggjum á tingið.

Rúna fekk einans 95 persónligar atkvøður týsdagin, aftur í móti teim 115 til seinasta val.

### Trupult at finna orsøkina

Sjálv heldur Rúna, at trupult er at vita, hvør orsøkin til afturgongdina kann vera. Hon vísur á, at fleiri faktorar spæla inn í einum valstríðið sum hesum, og at stemningurin móti endanum hevur nógv at siga.

– Ein av orsøkunum er sjálvandi, at eg sum kona, mamma og omma við einum manni til skips ikki havi havt eins góðar møguleikar og mannfólkini fyri at rikið eitt hart og intensivt valstríð. Men eg veit, at eg hóast alt havi gjørt eitt gott arbeiði, sigur Rúna.

Rúna Sivertsen er eisini einasta kvinnan, sum hevur havt fastan sess á tingið umboðandi fólkaflokkin. Umframt hetta er hon eisini einasta kvinnan, sum hevur havt fastan sess á tingið fyri Norðoyggjar Vit spurdu hana eisini, hví tað er so trupult hjá kvinnunum í fólkaflokkinum at sláa ígjøgnum.



*Rúna heldur sjálv, at tað er spell, at hon ikki verður við til at mynda flokkin í framtíðini*

– Ein av orsøkunum er sjálvandi, at vit ikki hava havt nóg sterk kvinnulig valevni, sigur Rúna.

– Men orsøkin er helst tann, at mannligi politikarin appellerar meir til fólkafloksveljaran, leggur hon afturat.

### Ein harður kampur

Onkur hevur eisini havt á lofti, at kvinnuligu valevnini hjá fólkaflokkinum ikki eru slopnar nóg væl framat í endaspurtinum av valstríðnum.

Men hetta, heldur Rúna, ikki er heilt satt.

– Kvinnuligu valevnini hjá fólkaflokkinum t.d. í Havnini hava verið nógv frammi. Men tað er púra satt, at eg sjálv ikki havi verið eins nógv at sæð sum mannfólkini, sigur Rúna.

Hóast Rúna hevur umboðað fólkaflokkin á tingið í 6 ár, so varð hon ikki biðin um at luttaka í nakrari sending, hvørki í útvarpi ella sjónvarpi. Fyri uttan teir fundirnar, har hon var sjálvskrivað sum luttakari í Norðoyggjum.

– Sum politikkari meti eg, at eg geri eina uppgávu fyri flokkin, og tí má leiðslan í flokkinum meta um, hvar eg geri flokkinum bestu tænastuna. Og tey heittu so ikki á meg um at verða við á nøkrum av hesum fundunum, greiðir Rúna frá.

Hon sigur eisini, at hon ikki er kedd av hesi avgerð, men tó metir hon, at flokkurin hevur gjørt ein feil við ikki at leggja meir dent á kvinnuliga umboðið.

– Men í einum valstríðið er altíð ein harður kampur um at sleppa framat, har tann sterkasti vinnur. Hesin kampur fer eisini fram í flokkinum, men eg havi so gjørt av ikki at verið ein partur av hesum kampi, greiðir Rúna frá.

– Men sjálv haldi eg tað verða spell, at fólkaflokkurin nú hevur mist einasta kvinnuliga vinkulin, leggur Rúna at enda afturat.